# Heilsan frá víkingunum



Brosjan er 3,5 cm í tvørmát og er ein frísk heilsan úr føroyskari víkingatíð Mynd: Jens K. Vang



*Hákun Andreasen, v.m., fann prýðislutin. Her er Hákun avmyndaður saman við Símun Arge, fornfrøðingi*
*Mynd: Jens K. Vang*

**Heima á Sandi hava fornfrøðingar funnið eitt spenni av sama slag i, sum funnin eru í víkingabústøðum í Norðurnoreg og Íslandi**

EDVARD JOENSEN

**Heima á Sandi:** Ein ábending um víkingabúseting á Sandi er komin undan kavi í útgrevstrinum á Junkarsfløtti. Eitt sermerkt spenni er millum lutirnar, funnir eru.

Á Føroya Fornminnissavni í Hoyvík sita tey í hesum døgum og reinsa ein spennandi lut, funnin er Heima á Sandi. Eitt runt spenni, sum er hægst á miðuni framman og holað eitt sindur aftan. Tað endar við einum tøppi og hevur vatnrætt nálfesti við eyga. Einki er fest í eygað á hesum spenninum, men onnur líknandi spenni, sum funnin eru aðrastaðni, hava ketu hangandi í, har ymsir pýðislutir eru festir í, sigur Símun Arge, fornfrøðingur.

Símun Arge sigur, at hann veit ikki heilt vist enn, hvussu hetta skal tulkast. Hetta spennið er av serligum slag, sum lítið er kent í sunnara parti av Skandinavia. Men hinvegin eru tey funnin í Norðurnoreg og eisini í Íslandi.

Hetta bendir á, sigur hann, at meira samband kann hava verið fyri norðan, enn higartil kanska er hildið. Eisini hjá føroyingum. Vit hava vanliga hildið, at okkara handilssamband hevur verið her á Vesturlandinum í Noreg og syðri. Men kanska hevur tað kortini verið soleiðis, at føroyingar hava verið við í tí samskifti, sum hevur verið millum Ísland og Norðurnoreg.

Mynstrið í spenninum, sum nú er funnið Heima á Sandi, er greitt eysturlendskt, sigur Símun Arge, fornfrøðingur. Baltiskt, russiskt ella kanska finskt/samiskt. Heilt óhugsandi er avgjørt ikki, at samband hevur verið millum norðbúgvarnar har norðuri og samar og finnar.

Tað er, sum sagt, í nýggja útgrevstrinum Heima á Sandi, at hetta spennið er funnið. Grivið er í tveimum støðum í bakkanum Heima á Sandi í summar. Tað var soleiðis, at bakkin var farin at loypa í turkinum, sum var í summar. Okkurt forvitnisligt kom undan, og Fornminnissavnið gjørdi av at kanna, hvat hetta var.

Undir Høgnamørk varð komið fram á toftir, sum enn ikki eru endaliga kannaðar og staðfestar.

Eisini á Junkarsføtti var okkurt forvitnisligt at síggja. Har varð eitt beni lagt opið, og fláirnar kannaðar einar fýra metrar niður. Funnir vórðu nógvir væl varðveittir lutir. Eitt nú ein rúgva av djóra- fugla- og fiskabeinum.

\- Og so høvdu vit eisini tað ótrúliga hepni, sum eisini skal til, tá vit funnu hetta spennið, sigur Símun Arge.

Tað gevur eina rættiliga góða ábending á, at her hevur veruliga verið mannabústaður helst longu í víkingaøld.

# No milk today

*Vegurin til fjósið í Fámara er so ringur, at ikki verður hildið ráðiligt at lata mjólkarbilin koyra eftir honum. Úrslitið kann gerast, at mjólkin ikki verður heintað*

EDVARD JOENSEN

**Fámara:** Nakrar dagar fyrst í september varð mjólkin ikki heintað í Fámara. Orsøkin var, at vegurin er so ringur, at tað var mett beinleiðis hættisligt at lata mjólkarbilin koyra eftir honum.

Tað hevur seinastu tvey árini verið klagað um, at vegurin til Fámará er í so ringum standi, at mjólkarbilurin ikki kann koyra eftir honum. Hann er bæði smalur og holutur. Og bæði brekkur og krøpp sving gera hann eisini illa farbaran.

Farmadeildin hjá Strandfaraskipum Landsins í Suðuroy røkir mjólkarflutningin fyri Mjólkarvirkið Búnaðarmanna . Strandferðslan hevur fleiri ferðir gjørt Vágs Kommunu, sum varðar av vegnum, varuga við, at flutningurin fór at verða steðgaður, um ikki skil kom á vegin. Tosað hevur hvørja ferð verið aftur til, at hildið er fram enn eina tíð, sigur Heini á Borg, farmaflutningsleiðari hjá Strandfaraskipum Landsins. Men einki munagott hendi, uttan at vegurin bara versnaði.

Avgjørt varð so at fáa ein óvildugan persón at gera eina kanning og meting av vegnum. Fólk frá Landsverkfrøðinginum í Suðuroy kannaði vegin, greiðir Heini á Borg frá. Og tann kanningin vísti, at vegurin er í so ringum standi bæði so og so, at har er einki hjá einum tangabili at gera.
Millum annað verður sagt í frágreiðingini, sum skrivað varð, at onkustaðni er vegurin bara 2,6 metrar breiður. Bilurin er 2,5 metrar breiður, so har er einki at geva út av.

Avgjørt varð so enn einaferð at gevast at koyra, og hesaferð varð gjørt álvara av, sigur Heini á Borg, farmaflutningsleiðari hjá Strandfaraskipum Landsins. Aftur varð samband við Vágs Kommunu, sum vildi hava tíð at viðgera málið. Tað er so enn einaferð játtað, sigur Heini á Borg. Hesaferð til mánaðarskiftið komandi. Men so verður ikki koyrt meira, um einki er gjørt við vegin, sigur hann. Og kemur kavi, er so púra knívskorið.
Vegurin til Fámara er gamal uppdyrkingarvegur, sum Vágs Kommuna hevur ábyrgdina av at halda.

Dánjal Bjarkhamar, formaður í Teknisku Nevnd hjá Vágs Kommunu, sigur, at teir hava viðgjørt málið og ásannað,a t vegurin er í



*Verða festaraviðurskiftini og vegurin til Fámara ikki í lagi heilt skjótt, verður mjólkin helst koyrd á sjógv Mynd: Edvard Joensen*

enn so, at við góðum vilja og skynsemi kann koyrast eftir honum, hóast hann ikki er sum ein góður landsvegur kortini.

Hinvegin vil Vágs Kommuna eisini taka ávís fyrivarni, tí festaraviðurskiftini í Fámara eru eitt sindur ógreið. Tað er nevnilig Fámara í løtuni. Gamli festarin hevur sagt festið frá sær, og eingin er settur aftur, verður upplýst av Jarðarráðum. Vágs Kommuna er ikki serliga sinnað at gera nakað stórvegis við vegin, fyrr enn greitt er, um nakað virksemi yvirhøvur verður í Fámara, sigur Dánjal

Eftir stendur so, at er eingin avgerð tikin um festaraviðurskiftini í Fámara áðrenn 1. oktober, verður eingin mjólk heintað úr fjósinum.



Luksusbilar við smáum prísum...

Júst nú er tann nýggi Nubira Stationcar heimkomin - og teir italsku designararnir hava gjørt tað aftur. Nubira er nú flottari enn nakrantíð.

Útsjóndin er ikki tað einasta góða við Nubira. Bilurin er á tremur av hentari útgerð m.a. sentrallás, servostýring, el-rútar, eldrivin/hitaði síðuspegl, tónaðir rútar og viðlitaðir kúfangarar. Nubira Stationcar hevur harafturat eitt av størstu viðførisrúmum í mun til aðrar bilar í sama flokki (1.840 litrar við niðurløgdum setrum).

Sjálvandi fylgir 3 ára verksmiðjugaranti/100.000 km og 6 ára rustgaranti við Daewoo bilinum.

Komið inn á gólvið hjá Esmari Simonsen á Kambsdali og royn Nubira.

Nubira Stationcar úr bert 168.700 kr. Nubira Sedan úr bert 158.700 kr.

Vælkomin!



Matiz er ein fittur og handligur 5-hurða mini MPV við sentrallás, el-rútar og servostýring.
Úr 99.985,-



Lanos 1,3 ella 1,5.
Rúmligur og fjølbroyttur.
(í klassa viðToyota Corolla).
Úr 119.985,-



DAEWOO GARANTI
3ár
ELLA 100.000 KM
6ár
MÓTI RUSTI

Nubira Stationcar úr bert
168.700,-
Sum sedan úr 158.700,-

DAEWOO
- ein skilagóð avgerð!

P/f Esmar Simonsen
Tel. 44 44 05 • Fax 44 46 29